gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

## Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur fyrrapartin, annars sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin gul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnpartin veksur hann vindin av landsynningi og regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Sum frálíður veksur hann vindin av eystri og landsynningi og regn megin-partin av degnum. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinni lækkar hann niður í sunnan og minkar vindin. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 12 stig.



*Mynd: Jón Ingi Ejdesgaard*

# Áarføri minti um verðsins enda

Jústinus Leivsson Eidesgaard

»Og áirnar skulu spríkja yvir det ganske land« sigur umvendi Klávus bivandi um heimsins enda í Feðgum á Ferð. Føroya land liggur illa sært eftir áarførið mánadagin. Bara í Oyndarfirði, har myndin er tikin sóust eini átta stórar skriður og í Norðoyggum eru brøttu líðirnar merktar av svørtum rípum og tær vena seg eymliga í dag sum koyrlaflongdar og sárar. Fleiri túsund tons av gróti, eyri, mógvi og mold eru komin oman úr fjøllunum, traðir liggja svartar, runutar,illa tøssaðar, meðan nýggir klettar í 100 tons klassanum kaga upp undan í allari evjuni. Teir hyggja bilsnir í kring eftir nýggja umhvørvinum, teir nú eru í. Fyri nógvum millíónum árum síðan komu teir flótandi upp úr jørðini. Teir hava ligið undir í ísi langt áðrenn nakað mannafótur trein í Føroyum. Nú eru teir aftur fluttir.

Stórá í Oyndarfirði hevur ongantíð veriið nærmáminda so stór, hvat menn vita um at siga, sum mánadagin. Áin vinstru megin hólman er eins stór og høgrumegin, sum er vanliga legan hjá ánni. Onkra løtu, bara nakrar minuttir, tá áarføri er, rennir eitt lítið sindur vinstrumegin, ella innanfyri sum oyndfirðingar taka til. Mánadagin var áin eins stór innanfyri sum heimanfyri og Hvíggjarfossur beint omanfyri brúnna hevði heilt mist skapið. Hann er ikki hvítur og vatnið verður ikki brotið, tað kemur í heilum líki oman, eins samanhangandi og í djúpum hyljum.

Sovorðnar dagar var ikki løgið, serliga í vekingartíðum, at tosað varð um evsta dag, eins og gløgga myndin hjá Heðin Brú um Klávus, minnir okkum á.




Eitt djúpt lágtrýst, 977 hPa. sunnafyri Ísland fer í útnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst í útsynning úr Írlandi fer í landnyrðing norðan.




Eitt lágtrýst millum Íslands og Føroya fer norðureftir, meðan eitt annað lágtrýst í útsynning úr Írlandi kemur móti Føroyum.




**Hitalagið mált frá 20./09. kl 06^00^–21./09. kl 06^00^. Hitin í gjár: 11,1°C**
Minsti hiti máldur í september: **÷0,5°** Mesti hiti máldur í september: **19,5°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 20./09. kl 6^00^–21./09. kl 06^00^**
Avfallið higartil í september: 75,7 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 15 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannahavn | 14 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | – |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 29 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 27 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

## Vestfalskyrrindi

21. sept.: Seinna kvarter
24. sept.: Mánin næstur jørðini
27. sept.: Tendring

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. sept. | 01.08 | 13.57 | 00.08 | 12.57 | 00.23 | 13.12 | 03.08 | 15.57 | 04.08 | 16.57 | – | 12.12 | 11.12 | – | 01.23 | 14.12 | 02.23 | 15.12 | 00.53 | 13.42 | 02.08 | 14.57 |
| 23. sept. | 02.49 | 15.41 | 01.49 | 14.41 | 02.04 | 14.56 | 04.49 | 17.41 | 05.49 | 18.41 | 01.04 | 13.56 | 00.04 | 12.56 | 03.04 | 15.56 | 04.04 | 16.56 | 02.34 | 15.26 | 03.49 | 16.41 |
| 24. sept. | 04.24 | 17.00 | 03.24 | 16.00 | 03.39 | 16.15 | 06.24 | 19.00 | 07.24 | 20.00 | 02.39 | 15.15 | 01.39 | 14.15 | 04.39 | 17.15 | 05.39 | 18.15 | 04.09 | 16.45 | 05.24 | 18.00 |
| 25. sept. | 05.32 | 17.58 | 04.32 | 16.58 | 04.47 | 17.13 | 07.32 | 19.58 | 08.32 | 20.58 | 03.47 | 16.13 | 02.47 | 15.13 | 05.47 | 18.13 | 06.47 | 19.13 | 05.17 | 17.43 | 06.32 | 18.58 |

sosialurin
www.sosialurin.fo